longum og stórum trol-hálum, og allur innvølurin verður støðugt blakaður í havið aftur.

**Tjóðarogn ókeypis til einstaklingar**

Seinnu árini hava okkara fólkavaldu kallar skipað fyri einum øðrum slagi av skilaloysi. Talan er um dýrabaru veiðiloyvini til fólksins ogn, tjóðarinnar fiskaríkidømi. Hesi eru latin ókeypis til nakrar fáar persónar og fyritøkur her á landi. Ístaðin fyri at lata tey aftur til landið, tá tey ikki verða nýtt meiri, er møguligt hjá hesum loyvis-havarum at selja hesi gjaldsleysu veiðiloyvi fyri stórar upphæddir. Upp í hundraðtals milliónir krónur og stinga vinningin í egnan lumma.

Einki ilt um teir. Loyvishavararnir hava einki lógarbrot framt, teir hava bara fylgt lógum landsins. Ørskapurin er framdur av lógarkrotusmiðum í løgtinginum. Skuldi onkur av tegnum landsins hugsað um framdu ógerðirnar sum skipað tjóðarrán og landssvik, so er tað ikki heilt óskiljandi.

**Liggja sum vit sjálvi hava reitt**

Okkara fólkavaldu valdshavarar hava seinastu tíggjuárini valt at ovurstuðla fleiri ódyggum einstaklinga- og virkisverkætlanum við milliard-upphæddum og undirstuðla tí stovni, ið av røttum átti at verið fólksins tøkniligu mentanarháborg og tjóðarinnar stoltleiki, nevniliga Fróðskapasetur Føroya. Á henda hátt hava valdu oddamenn okkara forða fyri skjótari og skipaðari framgongd her á landi. Hava forðað fyri øktum kappingarføri, áhaldandi kunnleikaframleiðslu, kunnleikaflutningi og nýskapan í ídnaðinum og búskapinum. Ja, hava so dyggiliga svikið granskingina í Føroyum seinastu hálva øldina. Men vit liggja sum vit sjálvi hava reitt. Føroya fólk hevur sjálvt valt landsins leiðslu. Tessvegna kann av røttum sigast, at vit føroyingar eru sjálvir fremsta forðing fyri framburði í Føroyum. Ei undur í, at vælútbúnir føroyingar aftra seg við at koma aftur til heimland sítt.

Δ

# Vælferð uttan sál er virðisleys (1)



HEIDI PETERSEN
løgtingskvinna, valevni Tjóðveldisfloksins

Heimsins bestu útbúgvingarskipan.

Hvørja ferð tá val nærkast, eru flokkar sum føra seg fram sum garantur fyri vælferðina hjá borgarunum í landinum.

Tað eru ikki smávegis garanti sum vera givin, lat meg byrja við útbúgvingarskipanini. Tað verður garantera eina útbúgvingarskipan sum sigur spar tvey til alt, millum heimsins fremstu í 2015; sum um tað ikki er eitt felagsmál fyri allar politiskar flokkar, at hava eina góða útbúgvingarskipan í landinum.

Trygd verður givin, men ikki eitt orð um innihald, hvat er hetta fyri ein útbúgvingarskipan sum er so fantastiska góð og framkomin, er hetta ein skipan sum byggir á kæft, trit og retning prinsippið, har disiplin, ordan og próvtøkur frá fyrsta flokki merkja dagliga dagin hjá næmingunum?

Ella er hetta ein útbúgvingarskipan sum setir næmingin í miðdepil og leggur størsta dentin á at menna einstaka menniskja við teimum førleikum sum tað hevur, ein útbúgvingarskipan har mál, mentan og søga hevur høga raðfesting, og ein skúli har næmingurin fær høvi at menna síni skapandi evni. Hetta seinna er í øllum førum tann skúlin eg vil berjast fyri skal gerast veruleiki í Føroyum, og við slíkum skúla veruliga seta Føroyar á heimskortið.

# Kavi alt vikuskiftið

**Sambært veðurmanninum, Peturi Skeel Jacobsen verður tað kalt, men gott veður um vikuskiftið.**

**Leygardagurin byrjar við góðum veðri: Tað verður turt og lítil vindur, og sólin fer eisini at kaga fram við millumbilum.**

**Seinnapartin veksur hann vindin nakað av útnyrðingi og norðuri og tað verður kavaavfall.**

**Sunnudagin heldur høgættin fram við kavaælum, men út á seinnapartin minkar hann vindin nakað.**

**- Og tað verður turt seinnapartin, sigur Petur Skeel.**



**Mánadagin verður lítið av vindi frá morgunstundini av.**

**Seinnapartin veksur hann kortini vindin nakað og tað verður lýggjari og regn.**

**- Alt vikuskiftið fer hitin um náttina at liggja um frostmarkið og um dagin beint omanfyri, sigur hann.**

# Avgerandi altjóða samstarv



HANNA JENSEN
valevni Fólkafloksins

Altjóða samstarv hevur altíð ligið mær á hjarta - samstarv millum lond, mál og mentanir. Føroyar eru skerdar, tá tað kemur til altjóða samstarv – tað hava vit óteljandi dømi um, og orsøkin er tann, at vit enn ikki eru vorðin sjálvstøðugt land.

Gjøgnum mítt starv sum studentaskúlalærari og lestrarvegleiðari síggi eg alt tað ríka tilfeingi, vit eiga í ungdómi okkara. Hesi eru tey, sum ígjøgnum altjóða samstarv á øllum hugsandi økjum, skulu bera land okkara inn í framtíðina.

Gjøgnum mítt starv kenni eg eisini til tær mongu forðingarnar fyri, at Føroyar kunnu luttaka í mongum altjóða samstarvi innan t.d. útbúgving, skúla- og orðabókaúygávu og gransking.

Úbúgving og gransking eru tó avgerandi fyri, hvussu vit sum land fara at klára okkum. Og útbúgving og gransking eru avgerandi, um vit vilja varðveita okkara vælferð og framburð.

Eg fari at virka fyri meiri og meiri altjóða samstarvi m.a innan nevndu øki - meðan vit arbeiða fram ímóti suverænitetstøkuni.

Hetta vil eg nýta fólkatingssessin til - fyri teg, fyri alt fólkið, fyri Føroyar, mítt land.

# Havið høvdið kalt



ÓLUVA NICLASEN
matvørufrøðingur, Velbastaður
Valevni Javnaðarfloksins

og hjartað heitt tá, krossurin skal setast týsdagin. Javnaðarflokkurin vil, at ríkisfelagsskapurin skal gerast ein virkisførur felagsskapur. Ein jøvn, livandi og dynamisk skipan. Við yvirtøkulógini kunnu vit flyta okkum heilt út á ytsa mark í ríkisfelagsskapinum; ein søk vit føroyingar sjálvir gera av. Gongdin til ytsa mark skal so avgjørt eisini vera dynamisk og livandi.

Støðan hjá Javnaðarflokkinnum til ríkisrættarliga spurningin er í veruleikanum sera greið, men tað tykist sum fólk ella kanska serliga onkur fjølmiðlafólk hava trupult við at skilja hana. Hjá okkum er veruleikin ikki bert svartur ella hvítur; loysing ella samband; ja ella nei. Vit siga ja til ein felagsskap so leingi hann gevur meining fyri báðar partar; til tess krevst vilji og alsom árvøka, so at felagsskapurin ikki gerst ein spennitroyggja.

Javnaðarflokkurin fer á Fólkating at røkja søk føroyinga í hesi skipan; tilvitandi um tær stóru avbjóðingar, sum liggja fyri framman, skal skipanin mennast, báðum pørtum til gagns.

Gott javnaðarval

# Danskar karamellir sum høgnesiskt agn

VIRGAR T. DALSGAARD



Tá ið heilatrusturin hjá tjóðveldismonnum fer í hermetiskt loyndarkabinett at hugsa djúpt, verður altíð barslað við *sjáldsomum* tankum. Til dømis var øll tann republikanska intelligensreservan saman í mánaðarvís, tá ið tey skuldu skifta navn frá tí *bundna* ***tjóðveldisflokkinum*** til tað *óbundna* ***tjóðveldi***. Verkir og rembingar vóru ógvisligar, og tey proklameraðu navnið, so errin og fegin sum tey allarlukkuligastu foreldur við evnaligum og vælskaptum nýføðingi. Harumframt reypaðu tey sær óført av navnagávuni sum einum *prægnantum* grammatiskum bragdi.

Gaman í, men annars vildu nógvir skeptikarar hildið, at tað er burtur úr vón og viti at kalla ein flokk fyri eina *republikk*. Man kann arbeiða fyri eina republikk, men at gera sjálvan flokkin til republikk virkar sum ein absurditetur! Men tað er kanska symptomatiskt fyri flokkin, at hann trívist allarbest í einum logiskum vacuum, heilt *in absurdum*!

Men tað er ikki nóg mikið við tað! Beint nú hevur tann danska- og norðuratlantiska heiladeildin hjá tjóðveldinum eisini roynt at spent seg út sum taktiskir filosoffar og politiskir pionerar. Teir hava sitið og rukkað pannuna í áravís í onkrum lýggjum donskum kabinetti á Fólkatingi, og har hava teir fingið tann eminent geniala idé, at teir til hetta fólkatingsvalið fara at býta út danskt framleiddar karamellir til teir sakleysu føroysku veljararnar.

Er tað nakað, sum tann føroyski veljarin harðliga treingir til, so er tað júst ótugdar danskar tjóðveldiskaramellir Longu mitt í vikuni var á gøtunum kring alt landið skipað fyri systematiskari og miðvísari *karamelluútbýting* av álvarsomum og stálsettum høgnesarum sum lið í sjálvbjargnistrembanini móti fullum veldi. Hetta er eitt einastandandi søtt og avgjørt nýskapandi politiskt initiativ, sum við donskum sukri kann slóra og camouflera tann fátæka ella manglandi politiska tjóðveldisboðskapin. Hann kann vera herskin at svølgja.

Innpakkingin av karamellunum er donsk, innihaldið er danskt, og tað uppfinnsama tiltakið er eisini væl og virðiliga goldið av donskum skattgjaldarum, so vit mugu erkenna, at tjóðveldisflokkurin er framvegis nakað av tí mest danska, vit hava!

Sum Atli Dam plagdi at taka til: "*Tað er eingin, sum er so grammur eftir donskum pengum sum júst tjóðveldismenn!*"

Tað sukursøta innihaldið í teimum donsku tjóðveldiskaramellunum skal helst káva útyvir, at teir grádigu norðuratlantisku kraddararnir eru politiskt fulkomuliga ørindaleysir. Teir renna bara privat ørindi fyri sín egna botnleysa pengapung! Men tann vanligi føroyski borgarin, sum ikki hevur *privata* slangu niður í danskar pengakassar, ja, hann fær sín *almenna* blokkpening skerdan av *karamelluflokkinum*.

8/11 – 2007

P. S.: Á tí dansktproduseraða karamellupappírinum stendur: www.dnag.dk, t. e. *Den Nordatlantiske Gruppe i Danmark* og harafturat stendur teirra logo.